Fylgiskjal 5.

LM-067/2022

Kristvør H. Poulsen

Fra: Rúna Hjelm <runahjelm@gmail.com>
Sendt: mánadagur, 6. september 2021 14:37
Til: Kristvør H. Poulsen
Cc: Magnus Gaard; Sigurð Ó. Vang; Óluva Zachariasen; Eyðun Húsgarð; Eydna Klakkstein Thomsen; Gudrun Zachariasen; VMR-Journal
Emne: Re: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd - freist 6. septembur 2021

Umhvørvis- og vinnumálaráðið,

- Hagafelag Føroya (Hagafelagið) fegnast um at landsstýrið soleiðis tekur stig til at fáa nútíðar lóggávu innan náttúruvernd í Føroyum. Hetta eisini í sambandi við altjóða skyldur Føroya í mun til sáttmálar innan náttúruvernd v.m.

- Sum heild metir Hagafelagið at uppskotið, herundir serliga kapittul 4 Økisvernd hevur nøkur áhugaverd amboð. Í mun til uppskotið, ið var til viðgerðar í løgtinginum í 2019, so tykist uppskotið at vera gjørt nakað einfaldari og helst eisini greiðari. Men tað avgerandi fyri Hagafelagið er at talan verður um eitt stórt framstig fyri munagóðari náttúruvernd og samstundis tryggja møguleikanum fyri einføldum útilívi hjá Føroya fólki. Tó so, at lógin er ein karmur, ið skal útfyllast við ítøkiligum stigum. Hetta síggja vit fram til.

Ítøkiligar viðmerkingar til einstakar greinar:

- Viðv. § 1 Endamálið

Hagafelagið tekur undir við uppskotinum til orðingar, ið vónandi vil kunna vera grundarlag fyri mongum skynsomum átøkum og fyriskipanum til frama fyri "...heilsu og trivnaði nú og í framtíðini"

- Viðv. § 5 Onnur týðandi samfelagsáhugamál

Er møguleika heldur breitt orðað, men er helst í lagi!

- Viðv. §§ 20-24 Økisvernd

Hagafelagið metir at hesir ymisku møguleikarnir fyri økisvernd eru serliga áhugaverdir og viðkomandi. Felagið vónar at landsstýrismenn/landsstýrið í komandi árum vil taka stig til at viðgera um nøkur økir kundu verið vard. Felagið metir, at tá lógin vónandi er samtykt, er upplagt at fara undir ítøkiliga viðgerð um gerð av bæði Tjóðgarðum, landslagsverndarøkjum, náttúrufriðøkjum v.m. Felagið ynskir gjarna at vera við til at eyðmerkja uppløgd økir at viðgera nærri.

- Viðv. § 25 Almannakunngerðing av verndarætlan

Hagafelagið sær fram til at slík uppskot fara at koma, herundir umsitingarætlanir, og fer eisini at nýta høvi til at gera evt. viðmerkingar. Hagafelagið vónar at uppskotið verður soleiðis samtykt, at feløg sum Hagafelagið innan viðkomandi ásetingar kunnu metast sum at hava lutvísan kærumøguleika sbrt. § 32.

- Viðv. § 30 Endurgjald

Tá talan er um lands-/festijørð, fer peningurin tá inn á festikontuna?

Vinaliga

Rúna Hjelm

LM-067/2022

Hagafelag Føroya

On Fri, Jul 23, 2021 at 3:24 PM Kristvør H. Poulsen <Kristvorp@uvmr.fo> wrote:

Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd til hoyringar

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendir við hesum uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd til hoyringar. Saman við uppskotinum til náttúruverndarlóg verður eisini uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing sent til hoyringar.

Uppskotið til náttúruverndarlóg kemur í staðin fyri ein part av galdandi náttúrufriðingarlóg, men fevnir eisini munandi víðari enn galdandi lóg. Av tí at uppskotið til náttúruverndarlóg ásetur nýggjar reglur um skipan av verndarøkjum og vernd av dýra- og plantusløgum, verða friðingarheimildirnar tiknar úr náttúrufriðingarlógini. Eftir uppskotinum til náttúruverndarlóg verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta slík verndartiltøk í verk, og ein náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, sum skal skipa og sita fyri verndini í verki.

Uppskotið til náttúruverndarlóg er ein liður í at fremja sáttmálan um lívmargfeldi í føroyskari lóggávu og miðar eftir at røkja lív-, landslags- og jarðfrøðimargfeldið umframt tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í tí føroysku náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki.

Uppskotið dagførir og fjøltáttar regluverkið um vernd av dýra- og plantusløgum og um økisvernd og útvegar heimildir til at basa hóttanini frá fremmandum lívverum.

Freistin at lata inn ummæli er mánadagin 6. september 2021.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið